# Kiwanis-dukkan, sum uggar og troystar innløgd



## Fyrsta føroyskt framleidda dukkan komin á marknaðin í samstarvi millum Kiwanis, Dugna og Landssjúkrahúsið

Fyrrapartin mánadagin var tíðindafundur í Kiwanishúsunum í Jøkulstræti í Tórshavn, í sambandi við, at fyrsta føroyska framleiðslan av Kiwanis-dukkum er komin á marknaðin í samstarvi við Landssjúkrahúsið og endurútbúgvingarstovnin Dugna.



*Petur Olivar í Hoyvík*



*Sámal Bláhamar*

Formaðurin í Kiwanis Eysturoy, Petur Olivar í Hoyvík, upplýsti, at teirra klubbur hevði átikið sær at standa fyri fíggingini av dukku-framleiðsluni, aftaná at hava havt vitjan av komandi økisstjóranum hjá Kiwanis, Sámali Bláhamar.

Sámal Bláhamar, sum hevur verið limur í Kiwanis, síðani hjálparfelagsskapurin varð settur á stovn í Føroyum, greiddi frá, at hann seinastu tíggju árini hevur arbeitt við málinum at fáa í lag eina føroyskt framleidda Kiwanis-dukku av sama slag, sum Kiwanis-felagsskapir í m.a. Noreg og Íslandi hava havt í mong ár.

Kiwanis Tórshavn, sum hann er limur í, hevur nógv at takast við m.a. sølu av jólatrøum hvørt ár umframt fasta siðin við 4-mamnafars-lutaseðlasøluni á ólavsøku. Tí hevði Kiwanis Eysturoy átikið sær hesa uppgávu.

### Klútadukka

Hann upplýsti, at Kiwanis-dukkan er ætlað børnum, sum eru innløgd á barnadeildunum á okkara sjúkrahúsum. Dukkan, sum er ein klútadukka, kann vera ein uggi hjá innløgdum børnum í sambandi við fyrireikingar til sjúkraviðgerð.

Hon er framleidd úr sóttreinsaðum endurnýtslutilfari frá vaskarínum á Landssjúkrahúsinum og seymað á Dugna, har tey, ið taka lut í framleiðsluni, kenna, at tey gera eitt týdningarfult arbeiði.

Ein dagin, Sámal Bláhamar hitti Sirið Stenberg, landsstýriskvinna við heilsumálum, og Eyðgunn Samuelsen, landsstýriskvinna við almannamálum, á trappuni úti á Tinganesi, greiddi hann teimum frá dukku-framleiðsluni. Báðar hildu Kiwanis-dukkurnar verða frálíkt hugskot og vildu fegnar vera við, tá fyrstu dukkurnar vórðu lidnar.

### Dukkan uggar og troystar

Eftir at ein trímannaður tónleikabólkur, ið kallar seg Fountainbólkurin, hevði sungið tvey fitt hóskandi løg,



*Fountainbólkurin*



*Sirið Stenberg, landsstýriskvinna við heilsumálum*

annað "Dukkan Fía" og hitt "Morgun", handaði Hans Højgaard, teimum báðum landsstýriskvinnunum Sirið Stenberg og Eyðgunn Samuelsen hvør sína dukku.

Hans Højgaard er ein av teimum trimum Kiwanis-limunum í Dukkubólkinum saman við Peturi Olivar í Hoyvík og Sámali Bláhamar.

Sirið Stenberg, landsstýriskvinna, takkaði fyri hetta sera góða og gevandi tiltak.

Í takkarrøðu síni upplýsti hon, at tá hon byrjaði í starvinum í landsstýrinum, segði lítla dóttur hennara við hana: "Mamma, ger okkurt gott fyri sjúk børn". Ein seðil við hesum orðum hevur landsstýriskvinnan hongt sum eina áminning skrivstovuvegg sín.

Sirið Stenberg nevndi, at dukkan var eitt sera gott átak. "At tað so samstundis er gjørt soleiðis, at Dugni tilvirkar dukkuna úr endurvunnum tilfari frá Landssjúkrahúsinum, ger átakið enn betur. Tað, at hjálpa børnum, at endurnýta og hugsa um umhvørvið, samstundis sum starvsfólk á Dugna fáa høvi at gera eitt meiningsfult arbeiði, er ein samanrenning av fleiri lutum, sum samvirka til tað góða".

At tað ikki er nøkur góð uppliving hjá einum barni at vera innlagt, vita øll. Tað er munandi frægari nú, eftirsum foreldur kunnu vera hjá barninum, meðan tað er innlagt.

Sirið Stenberg visti av egnum royndum, hvussu ringt tað var sum barn at liggja á einum sjúkrahúsi, kenna seg einsamalt og ikki hava mammuna hja sær.

Kiwanis-dukkan, sum barnið kann tekna á, kann gera sjúkahúsuppihaldið lættari og betri. Á tann hátt kann barnið vísa kenslur og tørv, sum tað annars ikki altíð megnar at seta orð á, segði landsstýriskvinnan við heilsumálum, Sirið Stenberg.

Dukkan kann somuleiðis verða eitt hent amboð, tá barnið skal fyrireikast uppá eina sjúkraviðgerð.

At barnið eisini sleppur at eiga dukkuna, kann gera, at tað fær møguleika at arbeiða seg gjøgnum upplivingarnar, tá tað er útskrivað.

Sirið Stenberg nevndi, at árliga er talan um meiri enn túsund barnainnleggingar um árið á føroysku sjúkrahúsunum.

At enda takkaði hon Kiwanis fyri teirra fantastiska arbeiði – eisini í hesum føri. "Tit geva ugga og troyst, sum veruliga munar".



*Hans Højgaard handar Eyðgunn Samuelsen eina dukku*

## Dukkan ein stór hjálp

Landsstýriskvinnan við almannamálum, Eyðgunn Samuelsen, helt í sini takkarrøðu, at tað var løgi, at EIN dukka skal hava serliga stórt virði fyri børn í Føroyum – enntá ein dukka uttan andlit, hár og klæðir.

Men tá hugt verður at royndunum, ið nøkur av grannalondum okkara hava havt við somu dukku, vísir tað seg, at júst henda dukkan hevur sera stórt virði, bæði fyri læknar, foreldur og ikki minst børnini, og í hesum høpi er dukkan ein stór hjálp.

Í røðuni vendi landsstýriskvinnan sær til Dugna og segði, at visjónin hjá hesum stovni er at ganga á odda við m.a. at virka við jaligheit og lokkandi samstarvsførleika, soleiðis at týðandi samstarvsfelagar ynskja at taka sosiala medábyrgd og virka fyri at víðka rúmliga arbeiðsmarknaðin.

"Tykkara visjón er ikki einans tóm orð, men heldur grundarsteinurin fyri tykkara dagliga arbeiði. Í dukkuni síggi eg orðini í tykkara visjón aftur: Jaligheit, lokkandi samstarvsførleiki, samstarvsfelagar, sosial medábyrgd og ein víðkaður rúmligur arbeiðsmarknaður".




*Leiðarin á vaskarínum á Landssjúkrahúsinum, Herborg Joensen*



*Johnny í Grótinum*

"Tí hetta er eitt arbeiði, sum gongur tvørtur um stovnar og felagsskapir, har Dugni, Kiwanis og Landssjúkrahúsið eru saman um eina verkætlan, sum hevur til endmaáls at veita ugga til børn, sum eru undir sjúkrahúsviðgerð – ein støða, sum fyri flest øll børn annars ann tykjast sera ræðandi".
Og hon helt fram og nevndi, at við hugskoti og stigtakan hjá Kiwanis, endurnýtslutilfari frá sjúkrahúsunum og arbeiðsorku frá Dugna, hava tit arbeitt saman um eitt gott endamál, og tað hevur eydnast tykkum at gagnnýta evnir og førleikar hjá hvørjum øðrum til fulnar.

Víðari segði landsstýriskvinnan við almannamálum, at tey, ið taka lut í dukku-framleiðsluni á Dugna, skulu vita, at tey gera eitt sera týdningarmikið arbeiði.

## Neutral dukka

Hon helt, at tey vóru heppin at fáa ein samstarvspartnara sum Kiwanis, tí uttan hugskot og stigtakan hendir einki. Haraftrat helt Eyðgunn Samuelsen, at tað var deiligt at hava aðrar stovnar so sum Landssjúkrahúsið, ið vilja stuðla verkætlanini við at veita tilfar.

Eisini hon nevndi, at Kiwanis-dukkan var eitt gott dømi uppá, at við einum jaligum hugburði og einum vilja til at fáa arbeiði at eydnast væl, bar til at hava eitt gott samstarv tvørtur um stovnar og felagsskapir til gagns fyri Føroya fólk.

"Hetta er nakað, vit myndugleikar kunnu læra av tykkum", segði hon, og helt fram, at sum landsstýriskvinnan í javnstøðumálum fegnaðist hon um útsjóndina hjá dukkuni. Dukkan er neutral, bæði viðvíkjandi kyni og húðarlit, og sendir hon tí eitt tekin til barnið um, at undir eini sjúkraviðgerðargongd hevur tað ongan týdning, um tú ert ein genta ella ein drongur, ella hvussu tú sær út.

"Tað sum hevur týdning, er, at tú sum barn kennir teg virt, hoyrt, skilt og trygt í gongdini".




Eyðgunn Samuelsen takkaði Kiwanis fyri at hava tikið stig til verkætlanina, Dugna fyri teirra frálíka arbeiði, og sjúkrahúsunum fyri teirra samstarvsvilja.

At enda ynskti hon øllum blíðan byr við verkætlanini við vón um, at børnini fara at fáa stóra gleði av dukkuni.

## Gott hugskot

Eisini sjúkrahússtjórin, Johnny í Grótinum, og leiðarin á vaskarínum á Landssjúkrahúsinum, Herborg Joensen, fingu hvør sína dukku.

Johnny í Grótinum takkaði fyri at verða boðin við. Hann hevði googlað seg fram til fleiri upplýsingar um Kiwanis-dukkuna og funnið út av, at vanliga plaga vit at siga, at við í Føroyum eru eftirbátur, upp til tíggju ár, tá tað kemur til menning av ymsum slag sammett við tað, sum fer fram í øðrum londum. Hann kundi upplýsa, at vit vóru 21 ár afturúr, tá tað kom til Kiwansdukkuna, sum upprunliga stavaði úr Belgia.

Hann eins og landsstýriskvinnurnar takkaði fyri, at Kiwanis hevði tikið stig til dukku-verkætlanina, og at Dugni hevði tikið hugskotið til sín, og vónaði, at dukkan fór at gerast eitt gott amboð til at lekjan og linna sjúkum børnum.
Við sær heimaftur fekk hann umframt sína egnu dukku, eisini eina Kiwanis-dukku til leiðaran av Barnadeildini á Landssjúkrahúsinum, Rúnu Wardum.

At enda takkaði leiðarin á Dugna, Hedvig Johansdóttir, øllum, sum høvdu tikið stig til dukku-verkætlanina. Hon takkaði starvsfólkunum á stovninum, og teimum á verkstaðnum á Kambsdali, sum høvdu átikið sær uppgávuna, ið gav arbeiði til fleiri fólk.

Fólk frá Dugna taka sær somuleiðis av uppgávuni, tá tað kemur til um flutning av tilfari frá vaskarínum í Havn til Kambsdal og retur við liðugt seymaðum dukkum.
Hedvig Johansdóttir var glað fyri, at Dugni m.a. við hesi framleiðslu kundi gera okkurt til stóra gleði fyri børn.
Síðani fingu øll, sum møtt vóru í Kiwanishúsunum til hesa dukkuløtuna, ein drekkamunn við nógvum góðum afturvið, sum starvsfólk hjá Dugna høvdu framleitt.



*Leiðarin á Dugna,*
*Hedvig Johansdóttir*